# Met á flaggdegnum

**394 rennarar – tað mesta nakrantíð - tóku lut á flaggdagsrenningi, tá Bogi Lenvig rann undir 12 ára gamla metið hjá Halluri Holm**

FLAGGDAGSRENNING
*Jákup Mørk*

Veðrið var av tí besta, tá Bragdið flaggdagin skipaði fyri 19. útgávuni av flaggdagsrenningini. Kanska høvdu umstøðurnar sítt at siga, men tað skerst ikki burtur, at Bogi Lenvig er um at renna seg heilt, heilt heitan til komandi oyggjaleikirnar.

Við tíðin, 22 minuttir og 30 sekund, rann Bogi heili 26 sek. skjótari enn gamla metið á 7 kilometra langa teininum. Tað metið hevði annars staðið í friði í 12 ár.

Og eisini vóru fleiri onnur góð úrslit at síggja. Millum annað rann bert 14 ára gamla Bjørg Herup Olsen seg inn á eitt bronsupláss hjá kvinnum.



*Við 394 luttakarum setti flaggdagsrenningin nýtt met mánadagin*

# Nú skulu puntarnir sendast

**Mánadagin verður lutur kastaður um, hvør hevur vunnið fótbóltsferðina, sum Atlantic Airways og Sosialurin skipaðu fyri**

FÓTBÓLTSFERÐ
*Jákup Mørk*

Síðani fyrst í apríl hava lesarar av Sosialinum havt møguleika at taka lut í kapping, her ein fótbóltsferð til útidystin móti Fraklandi kundi vinnast.

Í alt hava 15 puntar verið í blaðnum, og nú er savna hesar saman, so teir kunnu geva fullfíggjaðu myndina, sum eigur at vera á miðsíðunum í serblaðnum um fótbólt, sum kom á gøtuna um mánaðarskiftið.

Á hesum miðsíðum var eisini ein lepi, sum skal sendast inn saman við puntunum, soleiðis at tað er møguligt hjá okkum at seta okkum í samband við hepna vinnaran.

## Sendast fríggjadagin

Seinasta freist at lata okkum brævbjálvan við lepa og puntum er nú fríggjadagin. Mánadagin fara vit so at draga ein av bjálvunum upp, og so er spurningurin, hvat navn verður á lepanum, sum verður latin Atlantic Airways. Tað er nevnliga føroyska flogfelagið, sum hevur latið ferðina, og einki er at ivast í, at vinnarin ikki verður einsamallur á ferðini. Vanliga plaga føroyingar nevnliga at ferðast í stórum tali til útidystirnar hjá landsliðnum, og nú talan er um dyst móti einum av sterkastu fótbóltstjóðunum í heiminum, er einki at ivast í, at áhugin er óvanliga stórur.



*Tilsamans geva teir 15 puntarnir eina fullfíggjaða mynd til miðsíðurnar í fótbóltsblaðnum, sum varð á gøtuni um mánaðarskiftið*

**Fremstu luttakararnir í ymsu bólkunum vóru annars hesi:**

**Dreingir**

| Nr | Navn | Felag | Tíð |
|---|---|---|---|
| 1 | Eli Falkvard | Frælsi | 6.06 |
| 2 | Rúni Seloy | Bragdið | 6.31 |
| 3 | Ragnar Khaliqhey | Frælsi | 6.35 |

**Gentur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Vár Gregersen | Frælsi | 7.00 |
| 2 | Silja Niclasen | Frælsi | 7.04 |
| 3 | Sóldis Petersen | Tórshavn | 7.28 |

**Kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Súsanna Skylv | Tórshavn | 29.21 |
| 2 | Petra Gardar Neumann | | 29.28 |
| 3 | Bjørk Herup Olsen | Bragdið | 29.55 |

**Menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Bogi Lenvig | Bragdið | 22.30 |
| 2 | Guttorm Sørensen | Treysti | 23.27 |
| 3 | Jóan Karl Joensen | Bragdið | 24.29 |

**Veteranar, kvinnur**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Jóngerð Høgnesen | Bragdið | 33.29 |
| 2 | Súsanna Danielsen | Tórshavn | 37.44 |
| 3 | Louisa Svensson | Tórshavn | 37.52 |

**Veteranar, menn**

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | Jósvein Herup Olsen | Bragdið | 26.09 |
| 2 | Pól Sundskarð | Treysti | 26.58 |
| 3 | Tummas Joensen | Treysti | 27.32 |

W W W . S O S I A L U R I N . F O